## Klose noyðist undir knívin

Stjørnuspælarin Miroslav Klose má nú leggjast undir skurð, eftir at hann fekk skaða í dystinum hjá FC Bayern München um vikuskiftið. Klose stóð fastur í vøllinum, og hann fekk ein skaða í fótliðin. Klose verður tí ikki við hjá Bayern München næstu tíðina, og hann kann heldur ikki spæla næstu landsdystirnar hjá Týsklandi ímóti Liechtenstein og Wales. Skaðin kemur illa við hjá Bayern, tí frammanundan eru bæði Luca Toni og Franck Ribery skaddir.



## 15 ára gamal doyði í dysti

Ein ungur danskur málmaður doyði leygardagin, eftir at hann hevði fingið eitt knæ í nakkan undir einum fótbóltdsdysti á Frederiksberg. Dreingjaliðini hjá KB og B93 spældi venjingardyst, tá tilburðurin hendi. 15 ára gamli málmaðurin rendi saman við ein álopsspælara hjá mótstøðuliðnum, sum var blivin leysur. Málmaðurin misti vitið og fekk fyrstuhjálp beinanvegin. Hann var síðani koyrdur á Ríkissjúkrahúsi í sjúkrabili. Har kundu læknarnir bert staðfesta, at løsturin var so harður, at lívið á dronginum stóð ikki til at bjarga, skrivar Ritzau.

# Altíð okkurt nýtt at síg

**Hóast hann hevur verið blindur tað mesta av sínum vaksna lívi, letur Heðin Nolsøe ikki hetta forða sær í alla tíðina at geva sær sjálvum nýggjar avbjóðingar. Tí var tað ein persónligur sigur og stór uppliving fyri hann, at hann fyri tveimum vikum síðani gjøgnumførdi teir 90 kilometrarnar á heimsins størsta skíðfestivali, Vasaloppet í Svøríki**

ÍTRÓTTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*
*Myndir: Hans Hansen*



*Sjónin hjá Heðini Nolsøe fór at bila, tá hann var tannáringur, og hóast hann í dag bert kann síggja, um tað er ljóst ella myrkt, er hann sera virkin ítróttarmaður*

Mong munnu óivað kennast við navnið, Heðin Nolsøe. Í 15 ár var hann fastur spælari á danska goalball-landsliðnum, sum er eitt bóltspæl fyri blind. Hann var við til paralympisku leikirnar í USA í 1984 og í Seoul í 1988, umframt at hann í 1985 var við til at vinna gull í World Cup-kappingini í Calgary. Sum 35 ára gamal gavst hann á landsliðnum, og nú íðkar hann bara goalball á motiónsstigi.

Eisini munnu mong kennast við Nolsøe-eftirnavnið, tá talan er um fótbólt. Heðin, sum nú er 49 ára gamal, er úr Trongisvági, og hann er beiggi millum annað tiltiknu tvíburarnar hjá TB í 70-unum og 80-unum, Ásmund og Trónd, umframt Sigmund, ið eisini var við á gullliðnum hjá TB.

– Eg spældi eisini fótbólt sum smádrongur, og eg var við á bæði piltaliði og dreingjaliði hjá TB, til sjónin fór at bila so nógv, tá eg var 16 ára gamal, at eg ikki fekk hildið fram. Men ítrótturin hevur altíð verið ein partur av mínum lívi, og er tað framvegis, sigur Heðin, sum fortelur, at hann kvøldið fyri hesa samrøðu »svá« at í sjónvarpinum, at Liverpool smurdi Real Madrid av í Champions League.

– Fyri tað um eg ikki síggi myndina á skíggjanum, so hoyri eg jú, hvat teir siga, og upp á tann mátan kann eg fylgja við og ímynda mær, hvat hendir. Konan plagar at skemta við, at eg eri tann her í húsinum, sum hyggi mest í sjónvarp. Mær dámar so øgiliga væl ítrótt, at eg kann ikki lata vera við at tendra sjónvarpið viðhvørt, tá ein góður dystur er á skránni. Eisini ber í dag væl við at fylgja við tí, sum hendir í føroyskum ítrótti, so umvegis internetið fái eg nógv við av tí, sum hendir heima.

### Strævin startur

Orsøkin til samrøðuna við Heðin, er hansara nýggjasta avrik á ítróttarliga økinum. Sunnudagin 1. mars var hann ein av 13.873 skíðarum, sum stóðu klárir til start í heimsins størsta skíðfestivali, sum er svenska Vasaloppet, ið fevnir um 90 kilometrar, ið skulu avgreiðast innan 12 tímar. Annars verður tú koyrdur burturúr og sleppur ikki at halda fram.

– Eg kláraði tað upp á 11 tímar og 26 minuttir, so tað var eingin trupulleiki hjá mær. Eg gjørdist so ikki nummar sjokk, flennir Heðin, ið hevði ein norskan vinmann, Per Martin Larsen, við sær sum vegleiðara á teininum. Tað noyðist hann, tá hann skal standa á skíðum, uttan at síggja nakað sum helst annað, enn um tað er ljóst ella myrkt.

– Hetta var fyrstu ferð, eg var við til hesa skíðingina, sum hevur verið til síðani 1922, tá 119 skíðarar vóru við. Nú vóru næstan 14.000 við, so tú kanst ímynda tær, hvussu trongligt tað var, tá øll skuldu fara avstað í senn. Tað var nakað heilt serligt at skula starta saman við so mongum, men Per Martin hjálpti væl til, so vit ikki mistu hvønnannan burtur og so eg kundi finna sporini.

Heðin greiðir frá, at serliga starturin í Sälen var torførur, tí beinanvegin var ein brøtt brekka, og fyrstu fýra kilometrarnir vóru í mótbrekku, har øgilig rokan var, tí so nógv skuldu fara avstað í senn, so fleiri brutu stavarnar. Fyrstu 10 kilometrarnir vóru harðir, men tá Heðin og Per Martin vóru komnir niðaná, var meira opið og høgligari at skíða.

– Tá vit komu eitt sindur longur, spjaddi feltið seg, og tá var tað nógv lættari, enn tað hevði verið í startinum. Nú var landslagið nógv meira varierað og vit skíðaðu ígjøgnum fleiri smáar bygdir, har fólk sótu úti og hugnaðu sær, og onkrastaðni høvdu tey tendrað bál. Tá vit so komu framvið, vóru tey ófør at heppa, so tað var øgiliga stuttligt, sigur Heðin.

### Stór stjørna við

Ein teinur upp á 90 kilometrar er ikki smávegis at leggja aftur um seg, og tú skalt vera øgiliga væl fyri, skalt tú bara gjøgnumføra. Tí hevur Heðin eisini gjørt so nógv við kropliga venjing, sum tað hevur borið til hjá honum. Hann legði sær fyri einum ári síðani eina venjingarætlan, sum hann so hevur gingið eftir hvønn einasta dag, millum annað við venjing á kondisúkklu og rógvimaskinu.

– Tað var fyri einum ári síðani, at eg byrjaði at hugsa um Vasaloppet, sum jú er heimskent í skíðhøpi. Og til stuttleika kann eg fortelja, at eg aftaná havi lisið, at stóra svenska skíðstjørnan mitt í 80-unum og fyrst í 90-unum, Gunde Svan, eisini var við. So eg var bara í góðum selskapi, sigur Heðin, ið sjálvur hevur staðið á skíðum, síðani hann var um 30 ára aldur.

– Eg havi ongantíð staðið á skíðum sum síggjandi, so hetta var ein stuttlig og spennandi avbjóðing. Her eru ikki so nógvar brekkur og so nógvur kavi í Danmark, men kortini hava vit eitt skíðfelag fyri blind, sum eitur Blindes Skiunion, og har havi eg verið limur í 20 ár. Vit plaga at gera eina tríggjar ella fýra ferðir um árið til Norra ella Svøríkis, har umstøðurnar at skíða er munandi betri.

Heðin hevur danska konu, og saman eiga tey ein átta ára gamlan son, sum – eins og pápin – er blivin bitin av skíðingini. So tey eru eisini á skíðferðum sjálvi einar tvær ferðir um veturin í eina viku.

Hjá teimum, sum síggja, er kanska torført at ímynda sær, hvussu tað skal bera til at skíða blindur, tá tað jú er ivaleysa torført hjá mongum, ið síggja. Men her kemur vegleiðarin inn í myndina, tí tey blindu fara altso ikki einsamøll stormandi oman gjøgnum brattar brekkur ella í villum víddum, tí ein vegleiðari er altíð við.

Vegleiðarin heldur seg alla tíðina einar tríggjar ella fýra metrar framman fyri blinda skíðaran. Á ryggingum hevur vegleiðarin ein hátalara, og umvegis eina mikrofon kann hann so